## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av suðri og sólglottar, men eisini mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og14 stig.




**Veðrið Ólavsøkuaftan:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið Ólavsøkudag og mikudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, mikudagin av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 11 og 15 stig.

# Hampiligt ólavsøkuveður



*Veðurmaðurin ætlar sær ikki at hava regnskjól við á ólavsøku í ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður, væntar ikki, at neyðugt verður við oljuklæðum ella regnskjóli á ólavsøku. Okkurt ælið væntar hann kortini**

ÓLAVSØKUVEÐUR
*Edvard Joensen*

Ólavsøkuveðrið veðru hampiligt, væntar veðurmaðurin hjá Sosialinum, Petur Skeel Jacobsen.

Eitt sindur ósamdar eru veðurstovurnar um eitt lágtrýst, sum er eystan fyri skotland, men Petur Skeel væntar kortini ikki, at ta fer at órógva okkum nakað serligt á ólavsøku. Kortini er nakað tíðliga enn at siga heilt nágreiniliga, hvussu veðrið verður seinnu helvt av hátíðini, heldur hann.

Um ættina sigur Petur Skeel, at tað verður frískur vindur av útsynningi. Tað skuldi verið góð ætt til kappróðurin. Tað verður undan hjá bátunum undan Argjahøvda fram við molanum.

Veðurmaðurin væntar nakað av sól við onkrum ælingi inn ímillum. Kortini ikki so, at tað fer at bila nakað fyri karm. Ættin verður útsynningur, og hann væntar, at ólavsøkudagur helst fer at vera heldur lagaligari til vind enn ólavsøkuaftan. So hann er ikki bangin fyri at fara í føroyska búnan.

Sjálvur fer Petur Skell at halda seg nakað væl innandura á ólavsøku, sigur hann. Ikki orsakað av veðri, men tí hann ætlar sær at dansa. Føroyskan dans.

Ólavsøkuaftan fer hann at skipa Ormin Langa eftir fólkafundin á Háskúlanum, og bæði kvøldini ætlar hann sær í føroyskan dans í Sjónleikarhúsinum.

Hann heldur ikki, at hann fer at dansa eftir felagssangin á Vaglinum, sigur hann og vísir á, at tað er einki stuttligt at dansa millum glaspetti og annað órudd á asfaltinum har niðri.

Annars ætlar veðurmaðurin sær at vera hjástaddur, tá ólavsøkan verður sett, og kappróðurin ætlar hann eisini at síggja, sigur hann.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 14 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 19 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 21 |
| London | 20 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 21 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 24 |
| Moskva | 26 |
| Berlin | 28 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 30 |
| Malorca | -- |
| Athen | 32 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 38 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. við Hebridurnar fer í útnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1005 hPa. við Ermasund fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og dýpist. Lágtrýstið eystan fyri Hetland fer norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/07 kl. 06[00]– 25/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 12,2°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/07 kl. 06[00]–25/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 54,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

10. juli: Mánin næstur jørðini
13. juli: Full sól
21. juli: Seinna kvarter
22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juli | 05.13 | 17.36 | 04.13 | 16.36 | 04.28 | 16.51 | 07.13 | 19.36 | 08.13 | 20.36 | 03.28 | 15.51 | 02.28 | 14.51 | 05.28 | 17.51 | 06.28 | 18.51 | 04.58 | 17.21 | 06.13 | 18.36 |
| 27. juli | 06.01 | 18.26 | 05.01 | 17.26 | 05.16 | 17.41 | 08.01 | 20.26 | 09.01 | 21.26 | 04.16 | 16.41 | 03.16 | 15.41 | 06.16 | 18.41 | 07.16 | 19.41 | 05.46 | 18.11 | 07.01 | 19.26 |
| 28. juli | 06.51 | 19.16 | 05.51 | 18.16 | 06.06 | 18.31 | 08.51 | 21.16 | 09.51 | 22.16 | 05.06 | 17.31 | 04.06 | 16.31 | 07.06 | 19.31 | 08.06 | 20.31 | 06.36 | 19.01 | 07.51 | 20.16 |
| 29. juli | 07.40 | 20.05 | 06.40 | 19.05 | 06.55 | 19.20 | 09.40 | 22.05 | 10.40 | 23.05 | 05.55 | 18.20 | 04.55 | 17.20 | 07.55 | 20.20 | 08.55 | 21.20 | 07.25 | 19.50 | 08.40 | 21.05 |
| 30. juli | 08.28 | 20.52 | 07.28 | 19.52 | 07.43 | 20.07 | 10.28 | 22.52 | 11.28 | 23.52 | 06.43 | 19.07 | 05.43 | 18.07 | 08.43 | 21.07 | 09.43 | 22.07 | 08.13 | 20.37 | 09.28 | 21.52 |

5 707265 100067 >